Sig tína hjartans meining - orðið er frítt:

# Speakers Corner í Gongugøtuni í Havn

**Frá mikudegnum 6. juli kl. 16.15 hava øll, ið koma í miðbýin í Havn eitt stað at siga sína hjartans meining – á einum steini í nýggja torginum millum tinghúsið og gongugøtuna**



*Á hesum steini verður høvi hjá fólki at siga sína hjartans meining - fyrstu ferð týsdagin kl 16:15*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

SPEAKERS CORNER

Tað var tann tíð, tá ið vanligt var, at føroyingar í hópatali leitaðu sær á fólkafund at lýða á røður og njóta friðsælu náttúruna. Skyldfólk og kenningar hittust millum fjalla fagrar summardagar at hugna sær og syngja felagssangir.

Kendastu støðini at hava fólkafund í Suðurstreymoy eru óivað Reynsmúlalág, Mannafelsdalur, Varðholan og Doktaragrund úti á Reyni.

Men nógv vatn er runnið í sjógv síðani, at ungmannafeløgini skipaðu fyri fólkafundum kring landið. Treyðugt so, enn hoyra og lesa vit, at lýst verður við fólkafundi.

Í og uttan um Havnina eiga vit nógvar perlur. Ein er miðbýurin, har tað um summarið er ógvuliga lívligt. Tónleikabólkar, felagsskapir, skúlaflokkar og Kunningarstovan skipa fyri nógvum tiltøkum í gongugøtuni, men tað hevur líkasum víst seg, at okkurt hevur væntað, tá ið talan hevur verið um meiri spontan tiltøk, t.d. hevur leingi verið umhugsað at hava eitt stað, har borgarin kann sleppa framat at siga sína meining um eitthvørt. Tað verið seg "rós ella rís".

Tí hevur lendisdeildin í Tórshavnar kommunu saman við øðrum arbeitt við at hampa og fríðka um økið millum kioskina hjá Astu og Sparikassagarðin. Arbeiðið er liður í eini heildarætlan at hugna um í miðbýnum.

Økið er nú liðugt steinsett, og er mest líkt einum amfiteatri við fjølbroyttum møguleikum. Trøini og urtagarðarnir, sum Djóni í Geil, Trónd Hansen og onnur havnarfólk gróðursettu í miðbýnum fyri okkurt um 100 árum síðani, fegnast vit um og kunnu ikki ímynda okkum, hvussu verið hevði, um ahorn-, reyðbóka-, royniviða- og lerkatrøini ikki stóðu har í dag.

Tinghúsgarðurin er eisini ætlaður tónleikaframførslum, fundum av ymsum slagi, sjónleiki umframt kristiligum møtum. Tað er bara hugflogið, ið avmarkar tiltøkini.

Miðskeiðis í steinsetingini er lagdur ein stórur steinur, har høvið verður at siga sína hjartans meining um dagsins samfelagsmál, og hoyra meiningar hjá øðrum.

Í sambandi við, at arbeiðið at steinseta økið er liðugt, og at tað alment verður tikið í nýtslu mikudagin 6. juli, verður tónleikur frá kl. 15.30.

Áhugin at sleppa upp á talarasteinin er stórur, tí verður talutíðin mikudagin avmarkað til ein minutt.

Sagt verður frá, at Tórshavnar kommuna tekur onga ábyrgd av tí, ið sagt verður á talarasteininum.

KAMPANJUAVSLÁTTUR
UPP TIL
45.000 KR
VOLVO
FOR LIFE
VR BILAR




Sansir søkja samskipara/ráðgeva

## Tak tær væl av okkara kundum

Ein kampanja skal leggjast til rættis, og ein miðlaætlan skal leggjast fyri sjónvarp, útvarp og bløð. Faroe Islands Tourist Guide og Atlantic Review skulu hava greinar og lýsingar. Eitt útkast skal gerast til faldara, myndir skulu finnast og takast, og týska umsetingin skal fáast til vega.

Mongu og fjølbroyttu uppgávurnar á Sansum krevja ein væl skipaðan og nærlagdan samskipara, sum hevur skil fyri marknaðarføring og eitt gott eyga fyri smálutum. Tað kundi verið tú!

Umframt arbeiði sum samskipari, skal tú vera før/ur fyri at tosa við okkara viðskiftafólk um, hvussu teirra vøra ella tænasta best verður marknaðarførd. Tú skrivar væl føroyskt og samskiftir lættliga á donskum og enskum. Tú hevur eina hægri útbúgving innan sølu og samskifti ella hevur arbeitt innan økið.

Tú kemur at arbeiða í einum samskiftis- og tøknihúsi, sum hevur nakrar av teimum størstu og fremstu virkjunum í Føroyum í sínum kundaskara. Vit gera størri og smærri lýsingaátøk. Vit gera bløð, faldarar og aðrar prentlutir. Vit hava ment eina sera brúkaravinarliga CMS-heimasíðuskipan til internetið. Og vit hava okkara egna skeltaverkstað.

Í løtuni starvast 18 fólk á Sansum, sum eru í støðugum vøkstri. Umframt samskiparanum hava vit eisini søkt eftir einum fyriskipara og einum teknara.

Ljóðar samskiparin sum eitt starv fyri teg, so send eina umsókn við viðkomandi tilfari til okkara. Vilt tú hava meira at vita um starvið, kanst tú seta teg í samband við Høgna Rasmussen, stjóra á telefon 220401.

Seinasta freist at søkja starvið er 1. august 2005. Send umsóknina til: Sansir, Tinghúsvegur 47 Postboks 1099, FO-110 Tórshavn ella hognir@sansir.fo.

SANSIR

Postboks 1099, FO 110 Tórshavn, tel 355 355, faks 355 350, www.sansir.fo, info@sansir.fo




*Ester Kristiansen er sølufólk í nýggja baðirúmshandilinum við hjá Mariu Poulsen, sum letur upp týsdagin*

# Letur upp nýggjan baðirúmshandil

**Maria Poulsen letur upp nýggjan baðirúmshandil týsdagin**

NÝGGJUR HANDIL

– Nýggi handilin hjá Mariu Poulsen fer at hava Føroya størstu framsýning av baðirúmsmøblum og øllum, ið har til hoyrir. Í staðin fyri at selja baðirúmsmøblar saman við rørum og fittings, verður baðirúmsmøbilin settur í fyrstu røð. Somuleiðis hevur handilin eitt sera stórt úrvæl av kranum, kummum, brúsum og baðikørum. Tíðskil verður hetta ein lívsstíls handil, tí at dentur fer at verða lagdur á designmøblar og framsýningar sum inspirera keyparan. Soleiðis sigur pf/f Maria Poulsen í tíðindaskrivi.

Tey fara at leggja dent á, at baðirúmið ikki longur bara er eitt funktionelt rúm, men eisini er eitt rúm har dygd og lívsgleði koma til sjóndar. Soleiðis fer handilin at gerast leiðandi innan baðirúm í Føroyum, siga tey.

Nýggi handilin fer at selja danska merki Dansani, sum er tann største framleiðarin av baðirúmsmøblum í Danmark, av tí sama er dygd og design á hægsta støði.

At selja baðirúmsmøblar er tó ikki nýtt hjá Mariu Poulsen. Fyritøkan er yvir 60 ár og hevur selt baðirúmsmøblar í nógv ár. Fyritøkan er ment nógv seinastu árini, og í dag starvast fleiri enn 40 fólk hjá Mariu Poulsen, sum er største heildarveitarin innan hitaverk, vatn, sanitet, ventilatión, kloakk, baðirúmsmøblar o.a.

Nýggi handilin er á Smyrilsvegi 6 á Hálsi, við síðuna av nuverrandi bygningi hjá Mariu Poulsen, og hevur opið mánadag til fríggjadag kl. 10-17 og leygardag 9-13.